## DAGSINS MEINING

# Ársins kjakvirðisløn

Í sambandi við at framsýningin "Blaðtekning og fólkaræði" lat upp í Norðurlandahúsinum leygardagin varð eisini latin ársins kjakvirðisløn. Tað er Miðlahúsið, sum hevur tikið stig til hesa virðisløn, sum verður latin einum persóni, felag, felagsskapi ella stovni, sum hevur givið sítt góða íkast til at fremja samfelagsliga kjakið, ið er ein av grundarsteinunum undir fólkaræðinum. Saman við Føroya Banka letur Miðlahúsið eina virðisløn, ið er uppá 25.000 kr. Og hesa fyrstu ferðina fór hon til Óla Petersen, blaðteknara.

Tað var Bjarni Djurholm, varaløgmaður, sum handaði blaðteknaranum virðislønina, eftir at framsýningin við blaðtekningum varð sett í Norðurlandahúsinum leygardagin. Grundgevingin fyri at lata Óla Petersen "Ársins kjakvirðisløn 2006" er soljóðandi:

"Óli Petersen fær ársins kjakvirðisløn fyri listarliga virksemi sítt sum teknari, har hann støðugt hevur megnað at seta fokus á evni og samfelagsviðurskifti, ið hava týdning fyri fólkaræðið. Við blaðtekningum sínum og teimum viðmerkingum, sum ofta fylgja tekningunum, megnar Óli Petersen á listarligan og sera beinraknan hátt at lýsa mangt, ið torført er at siga í skrivt og talu. Á henda hátt hevur Óli Petersen ígjøgnum eitt heilt lív á ein framúr skemtiligan hátt givið sítt góða íkast til eitt samfelagsorðaskifti, sum er grundleggjandi fortreyt fyri einum nútímans fólkaræði."

Nú kundi verið spurt, hví slík virðisløn verður latin! Tá hugsað verður um, hvussu stóran týdning kjakið, orðaskiftið og debattin hava fyri fólkaræðið er tað væl náttúrligt, at vit gera vart við og undirstrika henda týdning. Og tað er rætt at gera tað á ein slíkan hátt, at tað eisini kann virka kveikjandi og stimbrandi fyri orðaskiftið í samfelagnum. Vit meta tað eisini vera náttúrligt, at slíkt stig kemur frá nettupp einum av landsins miðlum.

At Miðlahúsið tá hevur tikið hetta stig er í okkara verð eisini náttúrligt, tá hugsað verður um, at eitt av høvuðsendamálunum hjá Miðlahúsinum hetta fyrsta árið tað hevur livað sítt egna lív, hevur verið at taka stig til og stimbra almenna orðaskiftið. Í fyrsta lagi við at haa teir fysisku karmarnar til tess og síðani við at kunna varpa ljós á sama orðaskifti á teimum miðlapallunum, sum hoyra húsunum til tvs. fyrst og fremst blaðnum men eisini á internetinum. Og sjálvandi eisini at kunna borðreiða hetta fyri borgarunum og øðrum miðlum.

Tað eru nøkur ár síðani, at vit fóru frá dulnevndu lesarabrøvunum og var endamálið við tí avgerðini nettupp at menna almenna orðaskiftið. Seinni hava vit givið innivist fyri einum nýggjum kjakforum í blaðnum, "Tinghelluni" og somuleiðis latið Miðlahúsdyrnar upp fyri einum øðrum kjakforum, nevniliga "Trapputinginum".

Tað skal vera okkara vón, at ársins kjakvirðisløn kann menna og stimbra almenna orðaskiftið við at gera tað meira fólksligt, professionelt og náttúrligt.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Skomm at gera landsins størsta køst í Leirvík

**FREDRIK GØTE**
Leirvík

At Leirvíkar Bygdarráð gevur loyvi til at leggja dýrt keypt byggibúgvið ídnaðarøkið undir koyriveg, mann vera lítið umhugsað.

Skal bygdini vera lív lagað, má hon hava arbeiðspláss og bygdaráðið tey bestu ídaðarstykkini til veg, má kommunan hava onnur øki at vísa á.

Ein vegaføring um havnarøkið í Leirvík verður ongantíð gott, tí vit fáa onki afturfyri.

Eg haldi eisini, at kommunan eigur at spyrja løgreglu og Ráðið fyri ferðslutrygd um, hvat tey halda um hesa ætlan.

Kommunan má eisini spyrja Landsverk um tað er loyvt at neyðtaka havnina soleiðis, tí tað má vera hansara avgerð, tá ið samanum kemur.

Og tað verður eisini hansara skomm, tá ið Ytribogi í Leirvík verður gjørdur til landsins størsta køst, tí tað verður avleiðingin, tá ið alt verður byrgt av, har tvær stórar áir renna oman í, serliga tá ið tað er so stórur munur á flóð og fjøru, sum tað er her.

Vísast kann eisini á, at Leirvík er brimpláss, men nú er havnin fingin so fræg, sum hon kann verða.

Eg stúri fyri, hvussu havnin verður, nú alt skal fyllast uppaftur.

Sum støðan er nú, er einasta loysn at gera ein veg oman fyri bygdina, sum skal vera ein bygdarvegur, har tað bert verður loyvt at koyra 50 km/t. Tí verður tað verður ikki ein rasarabreyt, men ein vegur, ið lýkur øll vanlig trygdarkrøv.

Hesum mugu vit taka til takkar við, sum støðan er. Men eg fari at minna politikarar á, at tit hava svikið tykkara lyfti til leirvíkingar og tað er skomm at vera orðloysingar, sjálvt hjá politikarum.

# Spurningur til Vágatunnilin

**EDVARD JOENSEN**



Kann leiðslan fyri Vágatunilin siga, um tey, sum hava árshald hjá Vágatunlinum og hava goldið eitt mánaðargjald frammanundan, fáa hetta endurgoldið, nú gjørt er av, at koyringin gjøgnum tunnilin skal vera ókeypis eina viku?

# Skammilig flaggdagsrøða triðja ár á rað í Runavík

**JOHAN PETERSEN**



Runavíkar kommuna skipaði aftur í ár fyri politiskum flaggdagshaldi, har Tórbjørn Jacobsen helt tjóðveldisrøðu. Í fjør var tað Signar á Brúnni, í fyrraárið eisini Tórbjørn Jacobsen og fyri nøkrum árum síðani var tað Zacharias Wang, sum hildu politisku røðurnar

Triðja árið á rað hevur Runavíkar kommuna skipað fyri politiskum flaggdagshaldi, har tjóðveldismenn hava hildið politiskar røður.

**Zacharias, Tórbjørn, Signar og aftur Tórbjørn**

Fyri nøkrum árum síðan var tað Zacharias Wang og í fjør Signar á Brúnni, ið helt eina so partapolitiska røðu, har hann fór heilt niður í smálutir og greiddi frá atkvøðugreiðslu á tingi.

Í fyrra árið og aftur í ár var tað Tórbjørn Jacobsen, sum við buldur og braki tosaði um fullveldi, hjálandaveldi, Nyrup, blokk og niðurbinding.

Bert vakri og vælklingandi ljómurin frá Nes Sóknar Musikfelag við sínum sera vælspælda horntónleiki setti hátíðardám á løtuna,

Tað tykist ikki sum, at tjóðveldisfólk duga sær hógv, tá ið tey sleppa framat, tá ið hátíðarhald eru og sum skuldu kunna verið fyri allar føroyingar, óansæð politiskan lit. Og tíverri tykist tað, sum um tey altíð sleppa framat at niðurgera tey, sum ikki eru politiskt samd við tey.

Hvør minnist ikki, tá ið Karin Kjølbro fyri nøkrum árum síða setti ólavsøkurøðuna – heldur ikki hon kundi halda sær og bar fram tjóðveldis- og fullveldisboðskap.

**Vanvirða Merkið?**

Er Merkið við tess kristnu ímynd ikki samleikatekin alra føroyinga? Er tað ikki at vanvirða Merkið, tá ið tað verður drigið niður á eitt so lágt støði, sum tjóðveldispolitikkur er?

# Spurningur til Jacob Vestergaard

**EDVARD JOENSEN**

Kann landsstýrismaðurin við samferðslumálum siga, um tey, sum hava goldið mánaðarkort fyri dagliga ferðing við bussunum hjá Bygdaleiðum, fáa ein part endurgoldnan, ella um seinasta gjaldið verður galdandi eina viku longri, nú talan er um, at fólk, sum ferðast við Strandferðsluni, fara at sleppa at ferðast ókeypis eina viku?

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14$^{00}$



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.